## Noktaði at spæla

Álopsspælarin Xisco noktaði at spæla meira fyri enska felagið Newcastle, og tí varð hann beint fyri evstamark á spælaramarknaðinum leigaður til Racing Santander. Tað er spælarin sjálvur, sum greiðir frá hesum í blaðnum Sunday Mirror.

- Eg sá bara fleiri trupulleikar fyri framman, og tí var tíðin komin at sleppa úr felagnum, og eg noktaði at spæla fyri teir fyri at sleppa skjótari avstað, sigur Xisco.



## Frem bara tapir

Tað gongur einki hjá danska felagnum Frem, sum hevur havt fleiri føroyingar á liðnum seinnu árini, og har Jónas Tór Næss nú spælir. Liðið hevur spælt fimm dystir í donsku 1. deild og hevur tapt allar dystirnar. Um vikuskiftið royndi Frem seg ímóti FC Fyn og tapti 3-1. Frem liggur sum vera man aftast í 1. deild, og nú verður brúk fyri einum skjótum sigri, um Frem ikki skal missa sambandið við hini liðini í deildini.

# Fáir glottar

**Talan var fyri tað nógva um eitt føroyskt lið, ið so ella so undirpræsteraði. Og hóast kollektivið fekk eitt lyft eftir steðgin, so broytti hetta ikki heildarmyndina av einum dysti, har flestu spælararnir vóru undir tí, sum teir vanliga levera á landsliðnum**




Jákup Mørk

### 1. Jákup Mikkelsen, KÍ (64 dystir/0 mál)

Veteranurin og liðskiparin prógvaði enn einaferð, hvussu stóran týdning hann hevur fyri føroyska liðið. Á einum degi, sum væl kundi endað við skrædlið, hevði Jákup fleiri klassabjargingar, sum forðaðu eysturríkarum í at eyðmýkja føroyska liðið. Einki av málunum fekk hann gjørt nakað við, og tað er eingin sum helst ivi um, at føroyski málverjin eisini eitur Jákup Mikkelsen mikudagin.

### 2. Jónas Tór Næs, Frem (9/0)

Hevði eins og flestu liðfelagarnir stórar trupulleikar í fyrra hálvleiki. Í nærdystum sýndi Jónas vanligu styrki sína, men í avspælinum fram eftir vøllinum haltaði alvorliga fyrstu trý korterini. Millum annað við onkrum høpisleysum 50/50 sendingum inn á miðvøllin, sum góvu mótstøðuni góðar møguleikar at kontra. Spældi seg tó væl upp eftir steðgin, tá hann mest sum læsti høgra borð av fyri mótstøðuni.

### 3. Einar T. Hansen, NSÍ (7/0)

Var aftur á vinstra bakkinum, eftir at liðfelagin í NSÍ mátti geva avboð, men Einar megnaði ikki at sannføra um, at hann er framtíðar maðurin á plássinum. Hevði stórar trupulleikar í at plasera seg rætt, og tókst ikki heilt álvuligur í avspælinum. Kom tó nakað betur við í seinna hálvleiki, tá hann eisini kom meira niðan eftir vøllinum, men sum heild eitt avrik, sum runavíkingurin eigur at kunna betra næstu ferð.

### 4. Atli Gregersen, Víkingur (3/0)

Átti sín lut í fyrsta sveisiska málinum, tá hann als ikki fekk fatur á risastóra Maierhoffer, men spældi seg kortini hampuliga væl upp ígjøgnum dystin. Fleiri ferðir fingu stóru áleypararnir at sanna, at Gregersen-maðurin ikki er tann lættasti at flyta, og at enda kostaði hetta gult kort til Janco, sum í hevndi seg í frustratión. Brotssparkið dróg tó eisini niður í heildarmetingini, eins og hann í tveimum førum var um ein háls av longum sendingum úr Eysturríksku verjuni.

### 5. Egil á Bø, Víkingur (9/0)

Hevur seinastu tvey árini spælt seg til fast pláss í miðverjuni, men leygarkvøldið hevði hann ilt við at prógva, at hann er náttúrligt val til plássið. Tóktist ógvuliga tungur móti stóru mótstøðumonnunum, og megnaði als ikki at flyta føroysku verjuna niðan, hóast djúpi miðvøllurin eisini gjørdi hetta truplari. Sannførdi heldur ikki í avspælinum, har talan ofta gjørdist um langar bóltar beint niðan eftir vøllinum.

### 6. Atli Danielsen, KÍ (33/0)

Fyrri hálvleikur man helst hoyra heima millum teir, sum Atli helst av øllum vil gloyma. Hevði sera ilt við at koma í bóltvinnandi støður, og var lítið sannførandi í avspælinum. Reistist tó væl eftir steðgin, tá tað eisini eydnaðist føroyska miðvøllinu at seta seg munandi meira í respekt. Og so var tað stórt spell, at hann fekk leikbann sum úrslit av eini klokkureinari tackling, sum veiki maltesiski dómarin onkursvegna helt vera óreina.

### 7. Fróði Benjaminsen, HB (54/3)

Var alt fyri eitt nær við at javna eysturríksku leiðsluna, og var sum heild mest ágangandi føroyski miðvallarin fyri steðgin. Fór hart í mótstøðuna í nógvum luftdystum, og spardi seg heldur ikki niðri á vøllinum. Tað var tó greitt, at mótstøðan kendi hansara leiklut, og tí gjørdist Fróði ongan tíð nakað snúningspunkt í spælinum fram eftir vøllinum, tá hann ferð eftir ferð varð steðgaður við smáum fríspørkum. Fekk eisini eitt gult kort – og har við leikbann – áðrenn hann varð skiftur út.



**Longu fyrsta minuttin mátti Jákup Mikkelsen í meskarnar eftir bóltinum. Men málverjin spældi enn eina ferð ein rimmar dyst, og mest sum einsamallur var hann orsøk til, at tapið ikki gjørdist til skrædl**

Mynd: Polfoto

### 11. Símun Samuelsen, Keflavík (25/1)

Var ein av føroysku spælarunum, sum royndi at skapa nøkur gjøgnumbrot, men hóast fyrsta trekkið ofta var gott, so endaði mest sum alt í eini skeivari avgerð ella óneyvari sending. Kom nakað betur við eftir steðgin, men varð tó ofta offur fyri, at sendingarnar ikki lógu nóg neyvt, og fekk tí alt ov sjáldan brúkt ferðina. Og sum heild ein dystur, sum ikki telist millum teir bestu hjá vágbinginum.

### 9. Súni Olsen, Víkingur (36/2)

Var eins og Fróði offur fyri kynismuni í eysturríkska spælinum, soleiðis at hann sera sjáldan slapp at seta nakað føroyskt mótálop ígongd. Hevði hinvegin nøkur vandamikil frísparksinnlegg, sum kundu givið mál, meðan ein frísparksroynd fór himmal høgt upp um og við síðuna av. Tóktist ikki veruliga at hava orkuna, sum hann vanliga hevur, og kom tí ofta at liggja upp á millumhond, tá okkara vóru í verjustøðu. Stóð seg hinvegin eina best av føroysku spælarunum í pasnings-spælinum, men útskiftingin av moyru beinunum var helst upp á sítt pláss, tá hugsað verður um, at tey aftur skulu brúkast mikukvøldið.

### 10. Christian Lamhauge Holst, Silkeborg (16/2)

Hevði mest sum ógjørligar arbeiðsumstøður í føroyska álopinum í einum dyst, har uppspælið sjáldan endaði við álopsstøðu. Arbeiddi tó knallhart, og rann eftir øllum tí, sum rennast kundi eftir. Megnaði eisini at koma til eina einstaka skotroynd, tá hann snaraði mótstøðumann av sær, men var í allar mátar alt ov einsamallur, til veruliga at fáa gleði av framúr arbeiðsavrikinum.

### 11. Bogi Løkin, NSÍ (9/1)

Arbeiddi við vanligum íðni, og legði nógvar kilometrar aftur um seg gjøgnum teir 90 minuttirnar. Og syrgdi saman við Jónasi fyri, at okkara høgra borð varð mest sum læst eftir steðgin. Kom tó sjáldan í nakrar vandamiklar støður í álopspartinum. Bæði tí hann sum høgrabeintur lá nakað ónáttúrligt í vinstru, og tí hann ofta trekti inn í vøllin. Var eisini partur av tríhyrninginum, sum varð fangaður alt ov lætt við næsta málið, men spældi seg væl upp, tá hann kom sentralt inn á vøllin. Hevði eina perluavlevering til Andreas, tá hesin skoraði, og var beint eftir hetta um at tackla seg leysan av mótstøðuni.

### Levi Hanssen, EB/Streymur (2/0)

Kom inn á høgra álopsborði, tá føroyingar móti endanum royndu at skapa nakað av trýsti. Megnaði tó sjáldan at seta seg ígjøgnum í nærdystunu, og kom tí heldur ikki veruliga við til at skapa nakrar vandastøður.

### Andreas Lava Olsen, Víkingur (4/1)

Sýndi sítt mest sum óhugnaliga upptrekk, tá hann spurtaði eysturríksku verjuna av og pyntaði um úrslitið. Røkti leiklutin sum einsamallur áleypari nakað øðrvísi enn Christian, og arbeiddi ikki eins intenst, men sýndi tó dygdir, sum eiga at gagnnýtast, soleiðis at tenninar í føroyska álopinum kunnu hvessast.

### Jann Ingi Petersen, NSÍ (14/0)

Fekk seinastu løtuna á vøllinum fyri Fróða Benjaminsen, men megnaði ikki at sannføra um, at hann skal vera náttúrligur partur av landsliðnum. Vann nógvar bóltar og bjóðaði seg væl til í uppspælinum, men alt ov ofta endaði hetta í høpisleysum sendingum, har av onkur var um reppi at kosta mál.